# Árinini fara at merkjast

**Ikki óvæntað er Landsbankin komin til ta niðurstøðu, at stígurin í føroyska búskapinum heldur fram. Eingin serligur vøkstur kann væntast, so leingi eingin alivinna er, og fiskivinnan minkar bæði í nøgd og prísi**

BÚSKAPARFRÁGREIÐING
*Edvard Joensen*



*Alivinnan hevur nátt botnin, sigur Landsbankin. Komandi tvey árini fer vinnan at hava positiva viðrisøking og ávirkan á føroyska búskapin*

Hóast Landsbankin ikki málar hin skortgráa á veggin, eru greiðar ábendingar í frágreiðing Landsbankans um búskaparmeting fyri 2005 og 2006, at tað verður ikki nakar vøkstur at vænta komandi tvey árini.

Tað kemur heldur ikki serliga óvæntað á, at tað er støðan í fiskivinnuni og alivinnuni, sum í stóran mun gera, at Landsbankin ikki roknar við nøkrum serligum vøkstri í búskapinum í 2005 og 2006.

Landsbankin hevur gjørt eina framrokning, sum sigur, at mest sannlíka gongdin er ein lítil vøkstur í BTU (brúttotjóðarúrtøkuni) upp á 0,7 prosent í ár.

Verri eru útlitini fyri lønarútgjaldingunum, sum Landsbankin væntar fara at minka við hálvumøðrum prosenti í ár.

Næsta ár væntar Landsbankin ein vøkstur upp á eitt gott prosent í BTU,og eitt lítið prosent í vøkstri í lønarútgjaldinum.

Grundarlagið, Landsbankin hevur til sínar framrokningar, er tøkt hagtalstilfar og samrøður við vinnu og stovnar.

Hesi tølini, sum nevnd verða, eru meðaltøl, sum roknað eru út. Tvær aðrar útrokningar eru gjørdar. Ein betri og ein verri.

Tað er afturvendandi í frágreiðing Landsbankans, at vánaliga støðan hjá alivinnuni er rættiliga avgerandi fyri væntaðu gongdina. Eisini fiskiskapur og fiskaprísir hava stóra ávirkan.

Landsbankin væntar ikki, at trupulleikarnir hjá fiskavirkjum á landi og rækjuvinnuni fara at minka í framtíðini. Og bankin heldur, at eitt nú vinnulívsstudningur bert fer at útseta tørvin á tillaging í hesum vinnum. Men hinvegin ásannar Landsbankin, at framleiðsluvirðið og negativa virðisøkingin í alivinnuni náddi botnin í 2003/2004, og at vinnan nú so smátt er við at flotna uppaftur og fer væntandi í 2005 og 2006 aftur at hava positiva virðisøking og ávirkan á føroyska búskapin.

Landsbankin sigur, at ein búskaparlig framgongd í føroysku vinnuni er treytað av eini tillaging til altjóða marknaðartreytir. Og hesum eigur tað almenna ikki at leggja forðingar fyri við eitt nú at eggja til útseting av neyðugum tillagingum við til dømis vinnulívsstudningi.

# Kórstevna í apríl

**Kórstevna verður í Eysturskúlanum leygardagin 9. apríl. Stóri denturin verður í ár lagdur á skráirnar hjá ymsu luttakandi kórunum**

KÓRSTEVNA
*Edvard Joensen*



*Skipað verður fyri kórstevnu á Eysturskúlanum í Havn leygardagin 9. apríl*

*Savnsmynd*

Kórsamband Føroya skipar 9. apríl fyri kórstevnu fyri føroysku kórunum. Hóast høvuðsdenturin verður lagdur á skráirnar hjá einstøku kórunum, verður eisini møguleiki fyri felagsvenjing og felags framførslu, sigur Kórsambandið í tíðindaskrivi.

Í ár hevur Kórsambandið gjørt av at halda kórstevnuna í ein dag. Tað er grundað á, at seinnu árini hevur áhugin ikki víst seg at vera so stórur, at tað hevur borið til at skipað fyri kórstevnu eftir gamla leistinum, sum tey taka til í Kórsambandinum. Tað vil siga stevnu yvir eitt vikuskifti, har vant hevur verið við stórum felagskórum og kendum útlendskum kórleiðarum.

Men kortini fer at bera til, at fá eitt sindur av felagsvenjing, um áhugi er fyri tí, sigur Kórsambandið í tíðindaskrivinum. Tað verður so við føroyskum kórleiðarum, sum hava hug at halda seg framat.

Kórsambandið heitir á bæði sangarar og leiðarar, sum hava hug at luttaka á stevnuni, um at siga frá hjá skrivaranum í Kórsambandi Føroya, Hans Jørgensen í Miðvági, í seinasta lagi tann 15. mars. Luttøkugjaldið er kr, 100,- fyri hvønn luttakara. Tilmelding er á tlf. 332318/218820 ella á teldupostadressuni johansa@post.olivant.fo

Eisini fólk, ið dáma at syngja, men ikki eru við í nøkrum kóri, hava møguleika fyri at sleppa við á stevnuna. Tey kunnu siga frá og sleppa so at luttaka í felagsvenjingunum, sum verða.

Kórstevnan 2005 byrjar við tilmelding og morgunmati á Eysturskúlanum leygarmorgunin 9. apríl klokkan 09.00. Síðan verður felagsvenjing til middags, tá ein matsteðgur verður. Hildið verður so fram við felagsvenjing og aðalroynd seinnapartin.

Klokkan 17.00 verður almenn konsert, har hvørt kórið, alt eftir, hvussu stór luttøkan er, sær einar seks til tólv minuttir í part.

Eftir konsertina verður hugnalig samkoma fyri luttakarunum. Fyri ein sámuligan eykakostnað, sigur Kórsambandið. Har verður sjálvtøkuborð og samsangur. Og sjálvandi verður eisini farið upp á gólv aftaná. Bæði á føroyskum og útlendskum, sum tað stendur í tíðindaskrivinum.